Álit

í

løgtingsmáli nr. 87/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya (Løgtings- og landsstýrismenn v.m., broytt starvsheiti)

Johan Dahl, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Hervør Pálsdóttir og Jóhannis Joensen hava vegna Formansskapin í Løgtinginum lagt málið fram tann 24. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð tann 28. apríl 2025 er tað beint § 25-nevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 6. mai 2026.

Ein samd nevnd heldur eins og undanfarna § 25-nevndin, sum viðgjørdi løgtingsmál 69/2022, at tað er rætt at dagføra heitini hjá løgtings- og landsstýrisfólkum og øðrum politiskum embætum soleiðis, at hesi í størri mun avspegla dagsins talumál, har heiti, knýtt at kynunum báðum og felagsheiti verða javnsett.

Fyri Løgtingið hevur broytingin við sær, at heitini løgtingsfólk og tingfólk verða sett inn í Stýrisskipanarlógina sum felagsheiti fyri kvinnur og menn, ið sita á Løgtingi. Frameftir fara kvinnur á tingi eins og í dag formliga at kunna kalla seg løgtingskvinnur. Snýr tað seg um ein mann, verður heitið løgtingsmaður.

Nevndin tekur undir við uppskotinum, sum tað er lagt fram, og vísir annars til viðmerkingarnar í uppskotinum og álitið í løgtingsmáli 67/2022. Tað er umráðandi at leggja aftrat, at fyri at kunna broyta starvsheitini, má Løgtingið samtykkja hetta uppskotið óbroytt, fyri at áður samtykta uppskotið um tað sama saman við hesum uppskotinum kann verða sent løgmanni at staðfesta og kunngera.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

§ 25 -nevndin, . mai 2026

Johan Dahl	Hervør Pálsdóttir	Jóhannis Joensen
Sunnvá Dahl Høgfeldt	Bjarni Kárason Petersen	Sámal Petur í Grund
Steffan Klein Poulsen	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur	